LØGTINGSINS
UMBOÐSMAÐUR

Tórshavn, tann 13. mai 2020
J.Nr.: LUM-69- 20/00033-6
(at tilskila í svari)
Tykkara J.nr.

## ÁLIT FRÁ SETIUMBOÐSMANNI

**Álit**
viðvíkjandi klagu um vantandi svar frá Runavíkar kommunu

Við skrivi, dagfest 5. septembur 2019, hevur felagið Heimafriður sent umboðsmanninum soljóðandi klagu:

> " Runavíkar Kommuna letur sum einki og heldur fram at týna sínar borgarar.
>
> Felagið sendur javnan klagur, upplýsingar og fundarumbønir til Runavíkar kommunu, men hvørki avarandi borgarar ella felagið fær nakað svar frá Runavíkar kommunu.
>
> Runavíkar Kommuna letur sum einki.
>
> Vit mugu ásanna, at hvørki felagið ella borgarar verða hoyrdir ella viðraði av Runavíkar Kommunu.
>
> Heimafriður fær fleiri klagur um vikuna frá borgarum í Runavík og Strondum, sum klaga um gang frá skipum.
>
> Tað er harmuligt, at felagið fer aftaná fer má fráboða um gang frá skipum. Serliga á Skálafjørðinum.
>
> Heimafriður hevur hómað vilja til samarbeiði og skilna um støðuna frá Klaksvíkar-, Fuglafjarðar- og Tórshavnar kommunu. Ímeðan er eingin samarbeiðsvilji ella áhugið er at hóma frá Runavíkar kommunu. Kommunan heldur fram at týna sínar borgarar dag inn og dag út.
>
> Felagið hevur ikki orð, at lýsa framferðarháttin hjá Runavíkar Kommunu.
>
> Felagið heitur á landspolitikarar og avarandi myndugleikar um at taka ábyrgd fyri fólkunum her á landi…"

undir Bryggjubakka 11 • Postrúm 2008 • FO-110 Tórshavn • Tlf. 358500 • Faks 358501 • lum@lum.fo • www.lum.fo

**Málsgongd**
Í málsgongdini verður bert víst til samskiftið millum felagið Heimafrið og Runavíkar kommunu og ikki til klagur, sum einstakir borgarar hava sent kommununi um somu viðurskifti.

Tann 25. desembur 2018 sendi Heimafriður kæru til Runavíkar kommunu og løgregluna um skip, sum lá við bryggju í Runavík og larmaði og órógvaði jóladag. Víst varð til Halgidagslógina § 1 og Umhvørvisverndarlógina § 1 og heitt var staðiliga á myndugleikarnar um at finna loysnir, sum tryggja borgarunum frið í egnum heimi.

Tann 10. januar 2019 sendi Heimafriður Runavíkar kommunu áheitan um at leggja nóg sverar/tjúkkar káplar tøkar til skipini, nú kommunan skuldi leggja el káplar á kaiini og oman til skipini. Víst var á, at káplarnir skuldu kunnu veita nóg stóra streymorku, so tað ikki bara var nokk til ljós, men eisini til alt annað, so skipini kundu steðga motorunum.

Tann 4. februar 2019 sendi Heimafriður skriv til Runavíkar kommunu við kunning um, at fleiri borgarar í kommununi høvdu sett seg í samband við felagið og kært sína neyð orsakað av larmi frá skipum. Gjørt var vart við, at tey ið klagaðu, ynsktu at vera dulnevnd, og at klagan tí varð send frá felagnum. Sama dag sendi Runavíkar kommuna Heimafriði móttøkuváttan og kunning um, at málið varð latið Teknisku Deild til avgreiðslu.

Tann 25. februar 2019 sendi Heimafriður skriv til Runavíkar kommunu og bað um innlit í fleiri viðurskifti viðvíkjandi skipum, sum koma til Runavíkar Havn.

Tann 2. apríl 2019 sendi Heimafriður Runvíkar kommunu kunning um, at fleiri klagur vóru komnar til felagið síðstu dagarnar, og at borgarar stúrdu fyri heilsuni. Heitt var tí á kommununa um at finna eina loysn beinanvegin, soleiðis at borgarar ikki vórðu órógvaðir og kundu fáa hvíld.

Tann 4. og 29 apríl 2019 sendi Heimafriður skriv til Runavíkar kommunu um nógvu borgararnar í kommununi, sum kærdu sína neyð um larm, ristingar, luftdálkan og lukt frá skipum, tí tey ikki fingu hvíld í egnum heimi og ei heldur náttarfrið, og at fólk kendu seg noyddan at flýggja til annan bústað fyri at fáa frið og náttarhvíld. Víst var á, at borgarar í fleiri ár hava gjørt vart við hesi viðurskifti, men at kommunan ikki hevði gjørt nakað. Felagið vísti á, at borgarar blivu bæði sálarliga og kropsliga sjúkir, óarbeiðsførir, fáa varandi mein, flýggjaðu og stúrdu fyri heilsuni, tí einki hendi.
Felagið heitti á kommununa um at gera nakað við hesar trupulleikar og bjóðaði samstundis kommununi dialog og at hava framløgu fyri kommununi um, hvussu trupulleikin kundi loysast.
30. apríl 2019 váttaði kommunan fyri móttøku av fráboðanini og kunnaði um, at málið var lagt til avgreiðslu á Teknisku Deild.

Tann 8. mai 2019 sendi Heimafriður Runavíkar kommunu skriv um, at felagið seinastu dagarnar hevði fingið nógvar klagur um larm og royk frá skipum, sum liggja við kai í Runavík og Saltangará.
Sama dag svaraði býráðslimur í Runavíkar kommunu Heimfriði soleiðis:

> "Takk fyri tykkara áhuga um larm og royk frá skipum, sum liggja við kai í Runavík og Saltangará. Eg eri bangin fyri, at hesin trupulleikin ikki verður loystur tey fyrstu árini. Havnin verður bygd út og ein stór rampa skal gerast til flutning av treylarum/bingjum, ein og hvør sum hevur siglt við binguskipum veit, hvussu nógv tað larmar.
> Skulu vit loysa trupulleikan við royki og larmi í kommununi, so skal ein nýggj havn gerast ímillum bygdirnar Skála og Skálafjørð.
> Hesin trupulleikin kundi loyst larmin og roykin sum er í Kollafirði, Runavík og øllum Føroyum."

Sama dag takkaði Heimafriður fyri svarið og vísti á, at tað vóru fleiri átøk og broytingar, sum kundu setast í verk, sum kundu bøta og betra um umstøðurnar í Runavíkini.

Tann 11. juni 2019 sendi Heimafriður klagu til Runavíkar kommunu um larmandi ljósmotorar hjá skipum, sum liggja á Skála.

Tann 27. juni 2019 sendi Heimafriður tvær klagur til Runavíkar kommunu um larm frá skipi, sum lá við bryggju í Runavík. Av skjølunum hjá kommununi sæst, at klagurnar vórðu víðarisendar til Runavíkar Havn, og at tann 28. juni svaraði Runavíkar Havn kommununi, at okkurt var galið við ljóðpottinum hjá einum skipi, og at hetta skipið fór avstað seinnapartin.

Tann 2. september 2019 sendi Heimafriður skriv til Runavíkar kommunu um, at felagið hevði fingið enn eina fráboðan um larmandi skip og bað kommununa taka sær av sínum borgarum. Tann 3. september sendi kommunan Heimafriði móttøkuváttan og kunning um, at málið varð latið Teknisku Deild.

Tann 6. septembur 2019 gjørdi Heimafriður Runavíkar kommunu varuga við, at nógvar klagur vóru komnar seinastu dagarnar.

Tann 7. septembur 2019 sendi Heimafriður klagu til Runavíkar kommunu um eitt skip í Runavík, sum javnan órógvaði borgarar, sum búgva í kommununi.

Tann 12. septembur 2019 sendi Heimafriður skriv til Runavíkar kommuna og kunnaði um, at klaga var komin um skip, sum órógva borgarar á Skála. Sama dag váttaði kommunan fyri móttøku av skrivinum frá Heimafriði.

Tann 19. septembur 2019 sendi Heimafriður skriv til Runavíkar kommunu við fundaráheitan um ótolandi liviumstøður í Runavíkar kommunu vegna larmandi skip.

Tann 19. septembur 2019 sendi Heimafriður skriv til Runavíkar kommunu, har gjørt vart vart við, at skip lógu við kai og óróгvaðu nærum hvønn dag.

22. septembur 2019 sendi Heimafriður skriv til Runavíkar kommunu, har gjørt varð vart við, at skip á Skála órógva. Felagið heitti á kommununa um at fáa hetta í rættlag og spurdi, nær felagið kundi koma á fund við kommununa.

**Partshoyring**

Umboðsmaðurin gjørdi av at kanna hetta málið nærri, og við skrivi, dagfest 10. septembur 2019, varð klagan send Runavíkar kommunu til ummælis við einari freist áljóðandi 3 vikur. Samstundis varð kommunan biðin um at lata umboðsmanninum øll skjøl í málinum til láns.

Tann 14. oktobur 2019 móttók umboðsmaðurin skriv frá Runavíkar kommunu, dagfest 25. septembur 2019, og skjølini í málinum. Skrivið, sum var undirskrivað av borgarstjóranum, var soljóðandi:

> **“Viðv.: Klagu frá Heimafriði.**
>
> Samsvarandi klaguni frá felagnum “Heimafriður”, dagfest hin 5. september 2019, har heitt verður á Runavíkar kommunu um skriva eina frágreiðing um málið og at leggja skjøl við, sum hava samband við klagur um larm og royk frá skipum við Runavíkar havn, er hetta at viðmerkja um málið:
>
> Tað er eitt heldur sjáldsamt skriv “Heimafriður” hevur sent Umboðsmanninum. Orðingar sum “RK letur sum onki....”, “heldur fram at týna sínar borgarar....”, “hvørki felagið ella borgarar verða hoyrdir ella viðraði av RK......”, “Felagið hevur ikki orð, at lýsa framferðarháttin hjá RK”. Síðani verður víst á tað góða samstarvið, sum felagið hevur við aðrar havnir og kommunur í landinum. Hetta er ikki rætt. Tað er nógv samstarv millum havnirnar um hetta málið, onkrar kanningar eru gjørdar, men fysiskt er onki gjørt nakrar staðir yvirhøvur. Kommunufelagið hevur sett niður ein bólk undir Stýrinum, avloysarin fyri felagið “Føroyskar havnir”, har nógv fundarvirksemi hevur verið og tað seinasta nýggja í málinum er, at KF og Havnanetverkið hava heitt á avvarðandi landsstýrismann í málinum um at fáa ein fund í lag, har málið verður viðgjørt við tí fyri eyga, at fáa eina landsumfatandi loysn á málinum.
>
> Runavíkar havn/kommuna hevur fingið ein hóp av kærum um royk og larm frá skipum. Fyri tað mesta komu tær fyrstu klagurnar frá teimum somu fólkunum, 3-4 stk., upp til fleiri teldupostar um dagin frá teimum somu, men í seinastuni er hend tann broyting, at tað er felagið “Heimafriður” sum sendir kærurnar, sum skilst fyri onkran borgara, við ongari undirskrift og heldur ongari tilvísing, sum kundi givið eina ábending um, hvør ið persónurin er, sum sendir okkum kærurnar. Eitt dømi er hesin telduposturin:
>
> **”Fra:** Heimafriður <heimafridur@gmail.com>
> **Sendt:** 7. september 2019 22:32
> **Til:** Runavíkar Kommuna <runavik@runavik.fo>; us@us.fo; himr@himr.fo
> **…**
>
> Klaga er komin um skipið ... Fráboðað er um, at skipið órógvar javnan borgarar, sum búgva í Runavíkar Kommunu.

Vinarliga fá hetta í rætt lag, soleiðis at borgarar ikki blíva órógvaði"

Havnameistarin hevur gjørt alt tað hann kann, fyri at bøta um støðuna. M.a. er støðan viðvíkjandi royki nógv batnað síðani russisku togararnir fóru undir at nýta diesel olju áðrenn teir koma til lands og meðan teir liggja við bryggju. Skipini, sum larma mest av øllum, sleppa ikki inn á fjørðin longur – tey eru eini fýra í tali. Hinvegin verður málið ikki loyst til fulnar fyrrenn tað er møguligt at fáa ravmagn umborð frá landi. Í so máta er Runavíkar havn serstakliga væl fyri, av tí at SEV fyri kortum bygdi eina stóra transformatorstøð lúkst omanfyri bryggjuna í Runavík.

Áðrenn "Heimafriður" var stovnaður høvdu borgarar her í økinum skipað seg í einum Fb-bólki og kommunan tók stig til at hava ein fund saman við teimum um málið. Fundurin varð hildin í Býráðssalinum hin 5. oktober 2018. Tekniski leiðari greiddi frá málinum og eftir tað vóru orð skift um málið. Seinri hava vit havt fundir við SEV um málið. I hevur gjørt eina ljóðkanning fyri okkum og í umbúna er (er samtykt í býráðnum) at gera eina roykkanning í næstum.

Tað kann vera, at tað onkuntíð er ein bági, at skip liggja við bryggju, men táið fleiri teldupostar koma sama dag frá sama fólki, og grannarnir hjá viðkomandi ikki vera órógvaðir, tá byrjar tað at líkjast "spamming" ella knarri, og umsitingin í einari kommunu og á eini havnarskrivstovu hava úr at gera frammanundan, tí má, so segði danski umboðsmaðurin, á einum fundi í Nóatúni fyri nakað nógvum árum síðani, ein grovsortering gerast. Tað ber ikki einari kommunu til at samskifta upp í saman, í dagar, vikur og ár, við "kverulantar", sum hava tað til eitt slag av dagdvølju at órógva eina umsiting.

Runavíkar havn/kommuna hevur brúkt óteljandi tímar til tess at fáast við hetta málið, seinast fyri góðari viku síðani, tá ið vit hildu fund í 2 tímar saman Heimafriði og SEV í Løkshøll í Runavík. Samskiftið var gott og konstruktivt.

Nú er bert eftir at vóna, at landsstýrið ger nakað við málið (er staðfest í samgonguskjalinum) saman við kommununum soleiðis, at skipaferðslan í framtíðini fer at órógva minni enn hon ger nú. Fullkomin friður verður ongantíð, so leingi lív er í landinum, bygdir og býir liggja við havnirnar, men tað kann fáast væl frægari og minni órógvandi enn tað sum nú sigst vera ein trupulleiki hjá onkrum. "

Við skrivi, dagfest 21. oktobur 2019, vórðu viðmerkingarnar hjá Runavíkar kommunu sendar klagaranum til ummælis við einari freist áljóðandi 14 dagar.

Tann 3. novembur 2019 sendi klagarin umboðsmanninum soljóðandi viðmerkingar:

"Góðan dag

**Viðfest er:**

- Viðmerking til frágreiðingina hjá borgarstjóranum.
- Avrit av uppslagi hjá borgarstjóranum á Facebook, 02.10.19.
- 136 undirskriftir, frá borgarum í Runavíkar Kommunu, sum játta at skipini órógva tey. Undirskriftainnsavnanin hevur verið í 2 dagar og fleiri undirskriftir vera innsavnaðar. (*mín viðm.* Seinni komu fleiri undirskriftir)

Fleiri borgarar tordu ikki at skriva undir, hóast tey vóru púra samd. Tey vóru bangin fyri møguligum avleiðingum frá kommununi.

- Áheitanarskriv frá Pál Weihe og Landslæknanum.

Í skrivinum verður víst til Environmental Noise Guidelines for the European Region – Executive summary (2018):
…

**Viðmerkingar til frágreiðing hjá borgarstjóranum til Løgtingsins Umboðsmann, dagf. 25.09.19**

Borgarstjórin í Runavíkar kommunu fýlist á útsøgnina hjá Heimafriði, um at kommunan týnir sínar borgarar. Hann heldur útsøgnina vera ov ógvusliga. Men útsøgnin hjá Heimafriði er als ikki ov ógvuslig, tí øll gransking vísir, at so nógvur larmur, sum borgarar hansara verða útsettir fyri, er drepandi.

Tað er ikki uttan orsøk, at Heimafriður hevur sett seg í samband við Løgtingsins Umboðsmann við klagu um Runavíkar kommunu. Vit meta tað er alneyðugt.
Borgarstjórin í Runavíkar kommunu og býráðið hava *í vikur, mánaðir og ár* borið seg undan at gera nakað við málið. Grundgevingin hjá borgarstjóranum er, at klagurnar koma aftur og aftur frá ávísum borgarum, hvørs grannar ikki verða órógvaðir. Tískil metir hann, at klagurnar eru *spamming* ella *knarr*, sum hann málber seg. Hann fer so vítt, at hann kallar tey, sum hann í sínum starvi umboðar, fyri *kverulantar*.
Men sakin er tann, at hesir sokallaðu *kverulantar*, eru teir borgarar, sum hava dirvið at standa ímóti órætti, og vera røddin hjá teimum, sum ikki tora at standa ímóti.

*Kverulantarnir* hava merkt sviðan av, at gera vart við seg. Ikki so frægt, at umboðið á hægstu rók so mikið sum vísir virðing fyri hesum borgarum. Borgarstjórin fer so langt, at hann fýlist á, at *kverulentarnir* órógva *umsitingina*.

Vit vilja minna á, at *kverulentarnir* eru skattaborgarar í Runavíkar kommunu, sum búgva í kommununi. Borgararnir vísa bert á ta sváru neyð, tey eru í, og biðja bert um frið í egnum heimi. Tey vísa á, at eitt ávíst virksemi í kommununi órógvar so nógv, at tað gongur útyvir teirra trivnað, svøvn, heilsu og heimafrið. Felagið Heimafriður røkir áhugamál teirra, sum eru fyri ágangi av larmi og tryggjar teimum anonymitet.

Fyri at lýsa niðrandi viðferðina *kverulantarnir* hava fingið, vilja vit vísa á eitt facebook-uppslag hjá borgarstjóranum, sum hann legði út eftir, at Heimafriður hevði verið á temafundi við býráðið 2. oktober 2019. Borgarstjórin fýlist her á, at ein av *kverulentunum* hevði sníkt seg inná fundin. Hesin *kverulantur* er nevndarlimur í Heimafriði. Heimafriður var innan fundin ikki biðin um at boða frá, hvør kom við á fundin. Tað tykist fyri okkum sum at borgarstjórin tilvitað er við til at heingja fólk út til onnur at niðurgera og happa. Niðanfyri uppslagið hjá borgarstjóranum komu niðrandi viðmerkingar, ið vístu á útsøgnina hjá borgaranum, sum í útvarpinum á middegi 2. oktober stóð fram og lýsti støðuna.

Óljóð er ógvuliga torført at máta og prógva. Uppliving av óljóði er ymisk og hátturin ljóð ferðast upp á er samansettur og torgreiddur. Viðurskifti, ið spæla inn eru eitt nú frekvensur, resonansur, veður og vindur, lendi, staðseting og tilfar. Tað forklárar, hví summi vera meint rakt, onnur ikki.

Borgarstjórin sigur, at "*havnameistarin hevur gjørt alt tað, hann kann, fyri at bøta um støðuna."* Havnameistarin er embætismaður, og ger ivaleyst bara tað, hann er biðin um, og tað, sum er í tráð við politikkin hjá Runavíkar kommunu. Um Runavíkar Kommuna veruliga hevði gjørt alt tað, sum hon kundi, høvdu borgararnir ikki verið so órógvaðir av gangi.

Felagið Heimafriður er sannført um, at larmandi virksemið á havnalagnum IKKI er alneyðugt fyri inntøkustøðið hjá Runavíkar kommunu. Útfrá roknskapinum hjá Runavíkar kommunu fyri 2018 kunnu vit staðfesta, at rakstraryvirskotið er lutfalsliga lítið í mun til samlaðu skattainntøkurnar hjá kommununi, sum í 2018 vóru 217 milliónir krónur.

Verður hugsað um tey mongu húsini, sum liggja rundanum havnalagið, og tað virðisfall, ið hevur rakt hesi síðan órógvandi skipini av álvara fóru at gera um seg fyri nøkrum árum síðani, er torført at síggja nakran samfelagsligan vinning yvirhøvur. Larmurin ger – alt annað líka – at húsini eru minni verd, og tapið mugu tey, sum ynskja at rýma frá ganginum bera. Vit hava biðið um útgreinað innilit í inntøkurnar frá havnarlagnum, men felagið hevur ikki fingið eftirspurdu upplýsingarnar og spurningurin er, hvør orsøkin er til, at innlitisumbønin ikki er gingin á møti.

Ei heldur er hesin trupulleikin ein varandi trupulleiki, sum er uppstaðin og ikki kann loysast ella flytast burtur. Runavíkar kommuna ger eitt aktivt val um at bjóða hesum órógvandi larmkeldum og eitrandi royki vælkomnum í kommununa, hóast borgarar gera vart við, at teir verða órógvaðir.

Ímeðan borgarstjórin gongur av einum fundi á annan og biður um alskins kanningar, rópa borgarar neyðarróp orsakað gangi og royki. Til ein varandi loysn verður funnin, eiga órógvandi skipini ikki at sleppa at bryggju.

Borgarstjórin skrivar, *at roykurin er nógv minkaður síðani krav varð sett um, at skipini skulu brúka diesel.* Spurningurin er, um borgarstjórin hevur trygd fyri, at skipini brúka diesel olju við svávulinnihaldi, samsvarandi kunngerð um luftdálking frá skipum, sum kom í gildi 1. juli 2018. Frá Umhvørvisstovuni hevur Heimafriður fingið upplýst, at ongar regluligar kanningar verða gjørdar.

Borgarar boða felagnum frá, at roykurin luktar illa og summi teirra fáa ilt í eygu og nøs. Eisini sigur borgarstjórin, at tey skipini, sum larma allarmest, ikki koma til bryggju longur. Men tað merkir ikki, at tey skipini, sum koma til bryggju, ikki órógva minst líka nógv.

Tað er vísundaliga prógvað, at eitt nú NOx, sum er í útlátinum á tílíkum skipum ,er heilsuskaðiligt. Somuleiðis er tað vísundaliga prógvað, at óljóð og serliga áhaldandi lágfrekvent óljóð, kann hava álvarsamar heilsuligar avleiðingar. Harafturat er hetta órógv, sum treingir seg inn á privata bústaðin hjá fólki. Tískil er ágangurin serliga ógvusligur og møðandi, tá fólk eru í hvílistøðu heima hjá sær sjálvum. Harafturat hevur svøvnur avgerandi týdning fyri, at eitt menniskja kann trívast og virka í gerandisdegnum. Hetta hevur Pál Weihe, yvirlækni, víst á í sambandi við júst hetta kjakið. WHO hevur útfrá gransking greiðar niðurstøður um tað sama.

Orð, sum borgarar ferð aftaná ferð brúka fyri at lýsa støðuna er: "*Torturur*". Hetta er ikki eitt lýsingarorð, sum felagið hevur brúkt, men er ivaleyst tað orðið, ið lýsir støðuna best.

At siga, at Runavíkar kommuna *týnir sínar borgarar* er tískil ikki ov nógv sagt, tí tað er í veruleikanum tað, granskingin vísir á.

Borgarstjórin í Runavíkar kommunu endurgevur úr skrivi frá Heimafriði og fýlist á orðingar og heldur upp á, at okkara skriv ikki er í tráð við veruleikan. Vit standa við tað, vit hava skrivað, tí hetta er veruleikin, sum limirnir hjá felagnum uppliva.

> Borgarstjórin endar skrivið við at siga, at hann vónar, *at landsstýrið ger nakað við málið*. Hann kastar sostatt ábyrgd og trupulleikan frá sær, hóast hann, saman við býráðnum, hevur møguleika at skipa soleiðis fyri, at fólkið, hann er borgarstjóri fyri, fær Heimafrið. “

Facebook uppslagið, sum felagið vísti til, stóð 2. oktober 2019 á profilinum hjá borgarstjóranum. Har stóð :

> “ Allar kommunur hava helst ta somu tilgongina, til tess at fáa fíggjarætlanina fyri næsta árið at hanga saman.
>
> Fíggjarkarmurin er samtyktur, men í dag brúktu vit allan dagin í Løkshøll fyri at fáa umsiting og politikk til at skilja hvørt annað, í mun til hvat ið ætlað verður.
>
> Dagurin byrjaði við fyrilestrum frá SEV og Heimafriði, og vit taka vitanina frá teimum til eftirtektar. Margháttligt kortini, at meðan fundurin millum partarnar gongur, hevur nationala rásin, KVF, public servise rásin, heilt onnur tíðindi at bera Føroya fólki.
>
> Kanska hevur B rætt, tá ið hann skrivar: “Verturin er granni við eina gestin, A (mín viðm), sum varðar av einum ógvuliga sjónligum áhugafelagsskapi fyri heimafriði, hann er eisini svágur við hon gestin, sum er fyrrverandi mentamálafrúa, og gesturin sum so er eftir, er fyrrverandi útvarpsmedarbeiðari.”
>
> Ikki sørt at eg kenni meg aftur í viðmerkingunum hjá B.
>
> Meðan vit sita á fundi við A og D, sum av órøttum hevði sníkt seg inn á fundin, hoyrist, at tey bæði hava varpað Runavíkar kommunu niður og norður í KVF-tíðindunum, meðan vit fundast saman við teimum,-tað havi eg nú ongantíð uppliva áður.
>
> Í uppvøkstrinum var lagt í ein, at vanligur fólkaskikkur var ein fyrimunur, skuldi man beganga seg ímillum vanlig fólk.
>
> Soleiðis er tað kortini ikki longur.
>
> Runavíkar havn er endað sum ein partapoltiskur pallur, har sjefideologurin yvir allar, E, nú ætlar at endurreisa sína egnu avmakt, sum spinndoktari og løntur sekreterur hjá F, og endaði sum óynsktur skrivari hjá javnaðarmanninum, G.
> Fíggjarætalanartilgongdin er byrjað. Ivist onga løtu í, at Runavíkar kommuna fer at semjast um eina FÆ2020, hóast vísar og ógvuliga sjónligar kreftir berjast ímóti at hetta skal bera til.
> Býráðið er meiri skilvíst enn populisman, sum E og hansara kumpanar royna at mála myndina so døkka um.
>
> ES. 210 fólk fleiri búgva nú í RK í mun til 1. januar 2017. “

Sama dag skrivaði formaðurin í felagnum Heimafriður soleiðis inni í profilinum hjá borgarstjóranum :

> “ Løgið at tú skalt gera slíkar niðurstøður uttan at kenna søguna.

Eg var á fundi við tykkum og einki annað. Og takk fyri fundin og takk fyri at vit endiliga kundu koma í dialog.
Tað er púra vanliga, at nevndarlimir eru partar av slíkum fundum við myndugleikar. D, er nevndarlimur og hevur einki annað gjørt galið.

Eg var á fundi og var ikki partur av innslagnum.

At Kringvarpið vil hava viðmerkingar frá borgarum í Runavík, sum vóru vitni til ræðuleikan, sum sníkti seg inná privata lívið og heimafriðin hjá borgarum, er ein sjálvfylgja. Og rós til Kringvarpið um at røkja sína skildu, sum public service stovnur.

Kringvarpið varpar út røddina hjá teimum, sum annars ikki føla seg hoyrdan av Runavíkar kommunu.

At tú torir at gera slíkar atfinningar.

Og harafturat leggur meg undir at hava serlig bond við Kringvarpið er langt úti.

Eg havi sagt tað fyrr og sigi tað aftur: borgarstjóri í Runavíkar kommunu, tak ábyrgd av tínum borgarum."

Við skrivi, dagfest 15. novembur 2019, vórðu viðmerkingarnar hjá klagaranum sendar Runavíkar kommunu til ummælis við einari freist áljóðandi 14 dagar.

Tann 20. novembur 2019 sendi Runavíkar kommuna umboðsmanninum skriv, undirskrivað av borgarstjóranum, sum var soljóðandi:

"Sum skilst av skrivi tygara, ið er dagsett í Tórshavn hin 15. november 2019, hevur felagið Heimafriður gjørt viðmerkingar til skriv okkara frá 25. september í ár.

Vit hava ikki aðrar viðmerkingar enn tað, at staðfestast kann, at Runavíkar kommuna ikki er fráboðað um, at ein innsavning er sett i verk av undirskriftum, og at hon heldur ikki hevur fingið nakrar undirskriftir flýggjaðar, ið hava við málið at gera.

Upplýsingurin um, at fleiri borgarar ikki tordu at skriva undir, tá ið undirskriftir vórðu savnaðar inn, fyri at gera vart við at skip órógva tey, tí at tey eru bangin fyri møguligum avleiðingum frá kommununi, er skelkandi lesnaður.

Vit liva í einum demokratiskum samfelag við treytaleysum framsagnarrætti undir ábyrgd, harvið er tað ein margháttlig insinuering, at Runavíkar kommuna fer at hevna seg inn á borgarar, um teir, sum í hesum førinum, ynsktu at skriva undir eina adressu, sum varpar ljós á, at skip sum frekventera Runavíkar havn órógva tey. Útsøgnin kann bert tulkast soleiðis, at tað hevur ikki verið serliga stór undirtøka fyri innsavningini hjá Heimafriði og limum tess, og fyri at fjala tann veruleikan, verdur ein fiktiv orsøk uppfunnin, sum er kommunalur hevndarhugur. Mangt verður í neyðini nýtt.

Annars hevur persónligi vangin hjá borgarstjóranum, á Facebook, als onki við hetta málið og Runavíkar kommunu at gera.

Tann 26. novembur 2019 vórðu viðmerkingarnar hjá Runavíkar kommunu sendar klagaranum til ummælis við einari freist áljóðandi 14 dagar.

Við skrivi, dagfest 29. novembur 2019, sendi klagarin umboðsmanninum soljóðandi viðmerkingar:

> "
>
> **Viðmerkingar til skriv frá Runavíkar kommunu, dagfest 20/11-19 - LUM-journal nr. 21-19/00082**
>
> Í brævi frá Runavíkar kommunu, dagfest 20/11-19, til Løgtingsins Umboðsmann verður m.a. fylgjandi ført fram:
>
> A) *"... at Runavíkar kommuna ikki er fráboðað um, at ein innsavning er sett í verk av undirskriftum, og at hon heldur ikki hevur fingið nakrar undirskriftir flýggjaðar, ið hava við málið at gera."*
>
> og
>
> B) *"... upplýsingurin um, at fleiri borgarar ikki tordu at skriva undir ... kann bert tulkast soleiðis, at tað hevur ikki verið serliga stór undirtøka fyri innsavningini hjá Heimafriði og limum tess, og fyri at fjala tann veruleika, verður ein fiktiv orsøk uppfunnin, sum er kommunalur hevndarhugur. Mangt er í neyðini nýtt."*
>
> Felagið Heimafriður hevur til A at siga, at felagið ikki hevur kent tað sum sína skyldu at boða Runavíkar kommunu frá, at undirskriftarinnsavnan varð sett í verk. Hetta er ikki nakað, sum borgarstjórin ella býráðið annars skal góðkenna. Undirskriftir, sum fyribils er savnaðar inn, blivu tann 28/11-19 beint undan býráðsfundinum, handaðar býráðsformanninum, Hetta var fyrsti býráðsfunur hjá býráðnum, síðani undirskrifta innsavningin varð sett í verk.
>
> Til B er at siga, at undirtøkan fyri 'adressuni' hevur verið sera góð millum nærmastu grannar hjá Runavíkar havn og aðrar borgarar í kommununi. Nakrir borgarar hava tó borið seg undan at undirskriva, tí teir stúrdu fyri møguligum avleiðingum. Hetta er ikki nakað Heimafriður hevur uppfunnið, men er bert ein staðfesting av fakta, m.a. eygleidd í sambandi við innsavnanina av undirskriftunum.
>
> Tað er áhugavert, at borgarstjórin metur, at hansara almenni facebook vangi, ikki hevur relivans. Tí vangin, hjá borgarstjóranum, er nevnliga almennur og harafturat skrivar hann um fyrisitingina og um felagið Heimafrið. Tískil er ilt at skilja, hvussu hetta ikki kann hava relivans? "

Við skrivi, dagfest 3. desembur 2019, vórðu viðmerkingarnar hjá klagaranum sendar Runavíkar kommunu til kunningar. Samstundis boðaði umboðsmaðurin pørtunum frá, at av tí at tað ikki varð mett at verða neyðugt við framhaldandi partshoyringum, varð nú farið undir endaligu viðgerðina av hesum málinum.

Tann 5. desembur 2019 boðaði umboðsmaðurin pørtunum frá, at av tí at umboðsmaðurin metti seg ógegniga at viðgera hetta málið, hevði umboðsmaðurin heitt á formansskapin í Løgtinginum um at taka støðu til hendan spurning.

Tann 13. februar 2020 kunnaði formansskapurin í Løgtinginum umboðsmannin um, at formansskapurin hevði tikið avgerð um, at Løgtingsins umboðsmaður var ógegnigur og tí ikki átti at viðgera hesa klaguna. Formansskapurin kunnaði samstundis um, at Jan Sjóstein, fyrisitingarstjóri í Almannaverkinum varð settur sum setiumboðsmaður í hesum máli.

Tann 21. mars 2020 var Runavíkar kommunu spurd um, um innlitsumbønin frá Heimafriði frá 25. februar 2019 var svarað.

Tann 24. mars 2020 svaraði Runavíkar kommuna :

> ” Vísandi til fyrispurning tín niðanfyri, havi eg kannað málið. Tað vísir seg, at Heimafriður ikki hevur fingið svar uppá innlitsumbøn teirra dagf. 25.02.19.
>
> Um kommunan skuldi svarað hesi innlitsumbøn frá Heimafriði, var talan eitt sera stórt kanningararbeiði sum fyrisitingin skuldi gjørt. Tað er ikki endamálið við innlitslógini, at umsitingin skal framleiða rúgvismikið tilfar, fyri at svara umbønini.
>
> Málið varð eisini kannað hjá løgfrøðingi, sum kom til somu niðurstøðu. Sí svar frá H, løgfrøðingi.
>
> Tíverri dugi eg ikki at finna í journalini, at Heimafriður hevur fingið svar frá Runavíkar kommunu uppá umbøn teirra 25.02.19 og tað er ein feilur, sum vit harmast um.”

**Niðurstøða**

Klagað er um, at Runavíkar kommuna ikki svarar skrivum frá klagaranum, og at kommunan ikki vil samskifta við klagaran um trupulleikarnar, ið standast av óljóði o.a. frá skipum, ið liggja við bryggju í kommununi.

Undir viðgerðini av málinum hevur klagarin eisini víst á ósvaraða innlitsumbøn umframt tær viðmerkingar, ið borgarstjórin í Runavíkar kommunu hevur havt á facebook. Eg havi avgjørt at taka hesi viðurskifti við í viðgerðina av hesum klagumáli.

*Vantandi svar frá Runavíkar kommunu*
Í sambandi við lýsing av málinum havi eg fingið skjøl frá Runavíkar kommunu, sum vísa gongdina í málinum um óljóð o.a. frá skipum, og at tað eru bæði einstakir borgarar og klagarin, sum hava klagað um hesi viðurskifti. Skjølini vísa eisini, hvat samskifti kommunan hevur havt seinastu árini við einstakar borgarar um støðuna, og hvussu kommunan arbeiðir við at loysa ella minka um trupulleikarnar av óljóði frá skipum.

Mín viðgerð fevnir tó bert um viðurskiftini millum klagaran og Runavíkar kommunu.

Av málsupplýsingunum sæst, at Runavíkar kommuna í nøkur ár hevur arbeitt við spurningum um óljóð frá skipum, sum liggja við bryggju í kommununi, og at støðan í løtuni er, at Runavíkar kommuna, eins og aðrar kommunur, umrøða og bíða eftir eini loysn, sum fevnir um alt landið.

Sum klagarin hevur víst á, er eingin ivi um, at fyri nógvar borgarar er talan um eina ótolandi støðu. Borgararnir eru javnan, í longri tíðarskeiðum, útsettir fyri larmi og dálking frá skipum –

eisini, tá teir eru inni í teirra egna heimi. Málið at tálma ella steðga óljóði frá skipum við bryggju liggur í løtuni til politiska støðutakan, og tí geri eg ikki meira við hendan partin av málinum.

Gongdin í málinum vísir, at klagarin við klagum, spurningum og fundarumbønum, í gott eitt ár hevur roynt at fingið eitt samskifti við Runavíkar kommunu um, hvat kann gerast við óljóðstrupulleikan.

Ein kommuna hevur sum myndugleiki skyldu at svara bæði borgarum og áhugafelagsskapum, tá hesir venda sær til kommununa. Runavíkar kommuna hevur í nøkrum førum (5 av 16) sent klagaranum móttøkuváttan og kunning um, at klagan ella fyrispurningurin er sendur víðari til Teknisku deild. Tann eina áheitanin varð tó svarað við, at ein býráðslimur í einum skrivi til klagaran greiddi frá, at trupulleikin við larmi og royki frá skipum við kai í Runavík og Saltangará væntandi ikki verður loystur tey fyrstu árini, og at roknast mátti við larmi, nú Runavíkar havn verður bygd út.

Tað er ikki nøktandi, at Runavíkar kommuna bert sendir móttøkuváttan og svar í onkrum føri, og at kommunan uttan grundgeving ikki svarar klaguni. Tað er heldur ikki nøktandi, at kommunan ikki svarar eini fundaráheitan, fyrr enn klaga er send umboðsmanninum.

Í frágreiðing til umboðsmannin um, hví kommunan ikki hevur svarað klagaranum, verður eitt nú sagt:

“ Tað kann vera, at tað onkuntíð er ein bági, at skip liggja við bryggju, men tá ið fleiri teldupostar koma sama dag frá sama fólki, og grannarnir hjá viðkomandi ikki vera órógvaðir, tá byrjar tað at líkjast “spamming” ella knarri, og umsitingin í einari kommunu og á eini havnarskrivstovu hava úr at gera frammanundan, tá má, so segði danski umboðsmaðurin, á einum fund í Nóatúni fyri nakað nógvum árum síðani, ein grovsortering gerast. Tað ber ikki einari kommunu til at samskifta upp í saman í dagar, vikur og ár, við “kverulantar” sum hava tað til eitt slag av dagdvølju at órógva eina umsiting .“

Uttan mun til um henda útsøgn er ætlað felagnum Heimafriði ella einstøkum borgarum, haldi eg, at útsagnirnar hjá Runavíkar kommunu eru ógrundaðar, bera brá av vantandi virðing fyri klagaranum, og at kommunan ikki tekur trupulleikan í nóg stórum álvara.

Eg haldi somuleiðis, at handfaringin av klagunum og áheitanunum ikki er í samsvari við góðan fyrisitingarsið. Metir kommunan, at talan er um fleiri áheitanir og klagur frá sama klagara, uttan at nýggir upplýsingar eru í málinum, og at so mikið stutt er millum klagurnar, at illa ber til at svara í hvørjum einstøkum føri, kann kommunan ístaðin velja at gera klagaran varugan við hetta og greiða frá, hvussu kommunan framyvir fer at samskifta um málið. Dregur málsviðgerðin út, eigur kommunan at boða frá um orsøkina til hetta, og um tað er møguligt, siga frá, nær ein avgerð væntandi fyriliggur.

*Málbrúk kommununar og nýtsla av sosialum miðlum*

Í sambandi við viðgerðina av málinum, havi eg undrast á málbrúkið hjá kommununi. Hetta ger seg galdandi fyri frágreiðingina til Løgtingsins umboðsmann frá 25. septembur 2019, sum er undirskrivað av borgarstjóranum fyri Runavíkar kommunu og fyri uppslagið á facebook vanganum hjá borgarstjóranum 2. oktobur 2019.

Kommunan hevur víst á, at privati facebook vangin hjá borgarstjóranum hevur einki við hetta mál at gera. Hesum eri eg ikki samdur í, tí borgarstjórin hevur ein opnan facebook vanga, har hann millum annað umtalar mál, ið eru til viðgerð í kommununi og vísir til fund, sum hevur verið við Heimafrið.

Ein borgarstjóri er bæði politikari og ovasti leiðari fyri ta kommunalu fyrisitingina. Borgarstjórin myndar kommununa, og góður fyrisitingarsiður er galdandi, tá hann fremur sína fyrisitingarleiðslu. Hetta er galdandi bæði tá borgarstjórin samskiftir í skrift og talu, og uttan mun til um samskiftið er í brævformi ella á sosialum miðlum. Tað er tí umráðandi, at borgarstjórin ger sær og umheiminum greitt, nær hann úttalar seg sum leiðari av kommunalu fyrisitingini. Borgarstjórin hevur á sínum facebook vanga umtalað aktuell kommunal mál og viðurskifti, ið eru farin fram á einum kommunalum fundi. Undir hesum umstøðum meti eg, at tað ikki er nóg greiður skilnaður millum leiklutin hjá borgarstjóranum sum ovasti leiðari í kommunalu fyrisitingini og sum privatpersónur á facebook.

Samskifti hjá kommununi og borgarstjóranum skal eftir góðum fyrisitingarsiði vera sakligt og virðiligt, og ansast skal eftir, at borgarar ikki vera niðurgjørdir. Í hesum høpi kann kommunan eitt nú áseta leiðreglur, sum stuðla undir, at samskifti fylgir góðum fyrisitingarsiði og gera mannagongd um, hvussu  kommunan brúkar sosialar miðlar.

Eg haldi, at Runavíkar kommuna í frágreiðingini til mín, dagfest 25. septembur 2019, hevur eitt niðrandi málbrúk um klagaran, og farið verður út um mark fyri, hvussu ein myndugleiki eigur at málbera seg sambært góðum fyrisitingarsiði. Serliga er tað niðrandi, at kommunan kallar klagarar fyri kverulantar, ið hava tað til eitt slag av dagdvølju at órógva eina umsiting.

Tað sømir seg heldur ikki borgarstjóranum, at seta fram ógrundaðar útsagnir um ein nevndarlim í felagnum Heimafriður, at leggja fólk undir ikki at duga fólkaskikk og at seta fram gitingar um samansvørjingar millum klagara og KVF í einum almennum facebook uppslagi. Eg haldi sostatt, at uppslagið hjá borgarstjóranum frá 2. oktober 2019 er ikki í tráð við, hvussu ein fyrisitingarmyndugleiki eigur at samskifta á sosialum miðlum.

*Ósvarað innlitsumbøn*

Av málsupplýsingunum sæst, at tann 25. februar 2019 sendi klagarin eina innlitsumbøn til Runavíkar kommunu og bað um innlit í fleiri viðurskifti viðvíkjandi skipum, sum komu til Runavíkar Havn. Runavíkar kommuna hevur ikki svarað klagaranum og harmast mistakið.

Sambært § 16 stk. 1 og 2 í innlitslógini (løgtingslóg nr. 133 frá 10. juni 1993 um innlit í fyrisitingina) skal ein myndugleiki, sum fær eina innlitsumbøn, sum skjótast gera av, um áheitanin kann verða gingin á møti. Er áheitanin um innlit ikki gingin á møti ella noktað innan 10 dagar eftir, at viðkomandi myndugleiki hevur móttikið hana, skal myndugleikin boða viðkomandi frá um orsøkina til hetta, og nær ein avgerð væntandi verður til skjals. At ein innlitsumbøn frá 25. februar 2019 ikki er svarað meira enn eitt ár eftir, at kommunan móttók umbønina, er als ikki nøktandi.

Samanumtikið fari eg tí at geva Runavíkar kommunu eina átalu fyri handfaringina av hesum málinum, og at heita á Runavíkar kommunu sum skjótast at avgreiða innlitsumbønina frá klagaranum.

Burtursæð frá omanfyristandandi átalum og viðmerkingum geri eg ikki meira við málið.

Jan Sjóstein
setiumboðsmaður